Ungir menn í hýruvogni varnaðust roykin:

# Koyrdu vit ikki framvið lógu tey helst aftur á

**- Ungi maðurin í húsunum var illa fyri, og eg haldi, at kvinnan var í ørviti av royki, sigur hýruvognsførarin, Gorm Simonsen, sum av tilvild hendan morgunin avgjørdi at koyra úteftir Landavegnum, tá ið hann skuldi koyra tveir ungar menn niðan á Næmingaheimið undir Fjalli**



*- Eg beri ótta fyri, at ungu fólkini í hesum húsunum høvdu ligið eftir á, um ungu menninir í hýruvogninum ikki høvdu sæð roykin og høvdu borið seg so skjótt at, sigur Gorm Simonsen, hýruvognsførari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SÓLSKINSSØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað var av tilvild, at eg avgjørdi at koyra úteftir Landavegnum um 05.30-tíðina páskamorgun, tá ið eg var á veg niðan á Næmingaheimið undir Fjalli við tveimum ungum monnum.

Soleiðis greiðir hýruvognsførarin, Gorm Simonsen, frá, sum var maðurin, ið gjørdist partur av bjargingini hjá tveimum ungum fólkum – manni og kvinnu – sum vóru í húsunum við Landavegin, sum eldur kom í tíðliga páskamorgun.

- Tað var so smátt farið at lýsa, og gøtuljósini gjørdu sítt til, at sýnið var hampiligt. Knappliga sigur annar av teimum ferðandi, at hann helt seg síggja royk úr einum húsum. Eg setti ferðina niður og steðgaði síðan á. Jú, nú sær annar av teimum ferðandi eisini bæði royk og eld.

### Kvikir menn

Gorm sigur, at báðir teir ungu menninir lupu út úr bilinum í skundi, og tá ið hann sjálvur hevði boðað frá eldinum, leyp hann eisini avstað - í hølunum á hinum báðum.

- Eg haldi, at hesir ungu menninir vóru óluksáliga kvikir og bóru seg ógvuliga skjótt at. Annar teirra fekk hurðina í húsunum upp beinanvegin. Eg haldi, hon var opin. Hann fekk fatur á manninum, sum rætti honum hondina og hálaði hann út í tún. At síggja til, var maðurin púrasta óhjálpin. Hann var illa fyri, men kom seg skjótt, tá ið hann kom út um. Eg haldi, at kvinnan meira at kalla kom sjálv út. Hon segði einki og vísti seg at vera í ørviti av roykinum.

Hýruvognsførarin sigur, at hann sá eld inni í húsinum, tá ið úthurðin var latin upp, men hann heldur ikki, at eldurin sá so stórur út.

- Men tað dugi eg ikki at meta um. Hann var í hvussu er nóg stórur, og roykurin var nógvur. Tað var eingin panikkur í, og tíbetur hasaði alt væl av.

### Høvdu ligið eftir á

Gorm Simonsen ber ótta fyri, at hesi bæði ungu fólkini høvdu ligið eftir á, um ungu menninir í hýruvogninum ikki høvdu sæð roykin og høvdu borið seg so skjótt at við at hjálpa teimum út úr húsunum.

Spurdur, um hann heldur, at tey lógu og svóvu, tá ið teir komu á dyrnar, sigur hann, at tað roknar hann við, men tað dugir hann sjálvsagt ikki at siga.

- Tá ið tey bæði ungu fólkini vóru komin út úr húsunum í øllum góðum, og løgreglan var komin á staðið, fekk eg at vita, at eg kundi fara.

Gorm Simonsen sigur, at hann koyrdi ungu menninar niðan á Næmingaheimið undir Fjalli.

- Teir rindaðu fyri bilin, og eg fór ein túr aftrat, áðrenn eg fór til hús at leggja meg, sigur hýruvognsførarin, sum ikki veit, hvaðani ungu menninir eru.

Sosialurin hevur roynt at finna út av, hvørjir hesir menninir eru, sum stóðu á odda fyri bjargingini páskamorgun, men í gjáramorgunin hevði ikki eydnast okkum at fáa orð á teir – ei heldur nøvnini á teimum.

---

Nýggj nevnd veljast fyri Framtaksgrunnin:

# Bjarni vil einki siga um sína avgerð

**- Eg havi tikið mína avgerð, og hon er suveren, men eg vil einki siga um, hvør avgerðin er fyrr enn fríggjadagin, tá ið eg fari at almannakunngera, hvør nýggja nevndin í Framtaksgrunni Føroya verður, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**



NEVNDARVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í seinasta lagi fríggjadagin, 1. apríl, skal landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hava valt tey fýra umboðini í nevndina fyri Framtaksgrunn Føroya.

- Eg havi tikið mína avgerð, men eg vil einki siga um hana, fyrr enn fríggjadagin. Í síðstu løtu fari eg at kunna løgmann, og síðan fari eg at boða frá fríggjadagin, hvør avgerðin er, sigur landsstýrismaðurin.

Bjarni Djurholm sigur, at tá ið stig verða tikin politiskt til at skipa vinnuligar grunnar, endar hetta ofta við fløkjum, tí tað vísir seg at vera trupult hjá vinnuni og politiska myndugleikanum at ganga hond í hond.

- Og tá ið tann politiska skipanin stendur aftanfyri ein slíkan grunn, er talan ikki longur um, at tað bara er landsstýrismaðurin, sum verður innblandaður, men fólk sum heild, tí avgerðirnar - so ella so - kunnu raka fleiri. Tað er skjótt at lata seg ávirka í slíkum málum, sum so mong hava eina ella aðra meining um.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera óheppið, at kreppuloysnir eftir donskum leisti framvegis skulu hava ávirkan á føroyska samfelagið.

- Hesar áttu langt síðan at verið fingnar av vegnum, sigur Bjarni Djurholm í stuttari viðmerking.

### Skulu hava innlit

Sambært skipanini fyri Framtaksgrunnin, skal nevndin fyri grunnin veljast fyri 1. apríl. Tað er ein 5-mannanevnd, sum mannar grunnin, harav Føroya Landsstýri velir fýra umboð. Síðan velja tey fýra sitandi umboðini fimta nevndarlimin.

Tey, sum manna sitandi nevnd, eru Dagmar S. Joensen, formaður, Árni M. Dam, Sjúrður Horsdal, Eydna Justinussen og Hans Andrias Joensen.

Í skipanini stendur, at nevndarlimir skulu hava innlit í vinnu-og búskaparlig viðurskifti og kunnu ikki vera løgtings-ella landsstýrislimir.

Framtaksgrunnur Føroya er vinnurekandi grunnur, ið hevur sum endamál at gera íløgur í nýggj ella víðkað vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsiktað kapitalavkast, ið stendur mát við váðan. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir við høgum vitanarinnihaldi.

Íløgan hjá Framtaksgrunninum kann latast sum innskot í eginogn ella sum ábyrgdarlán. Tá ið íløgan verður latin sum innskot í eginogn, skal Framtaksgrunnurin avhenda síni partabrøv, tá rakstur og felag metast at hvíla á einum burðardyggum grundarlagi.

Framtaksgrunnur Føroya skal virka sum íblástur og samstarvsfelagi hjá tí einstaka virkinum.